Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Ingilín Didriksen Strøm, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Viðgerð fyri barnloysi

Spurningar:

1. Kann landsstýrismaðurin grundgeva fyri, hví rundskriv nr. 9000 frá 2004 um stevnumið viðvíkjandi viðgerð móti barnloysi varð sett úr gildi í september í fjør?
2. Kann landsstýrismaðurin greiða frá, hvørjar reglur eru galdandi fyri tey, ið ynskja at sleppa í viðgerð fyri barnloysi?

Viðmerkingar:
Fleiri menn og kvinnur kunnu koma út fyri, at tað er trupult at gerast við barn. Tíbetur finst viðgerð fyri barnloysi, og fleiri uppliva at gerast við barn eftir at hava verið í viðgerð eina tíð. Hetta er eitt nógv umrøtt evni í londunum rundan um okkum, tí talan er um eina heldur dýra viðgerð, har fólk í summum førum sjálvi noyðast at standa fyri rokningini.

Av tilvild gjørdist undirritaða varug við, at rundskriv nr. 9000 frá 4. februar 2004 um viðgerð móti barnloysi varð sett úr gildi í september í fjør.[1] Rundskrivið staðfesti millum annað, at tað almenna fíggjar viðgerðina fyri upp til felags tvey børn fyri barnleys pør. Harafturat er eisini sett sum treyt, at einans hjún kunnu fáa viðgerð fyri barnloysi.

Fyri at fáa greiðu á, hvørjar reglur eru galdandi fyri viðgerð fyri barnloysi í dag, verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 5. mai 2021

Ingilín Didriksen Strøm

[1] https://logir.fo/Rundskriv/9000-fra-04-02-2004-um-stevnumid-vidvikjandi-vidgerd-moti-barnloysi